# Fíggjarleiðari til Bláa Kross Føroya

**Er tað tær vit bíða eftir?**
Nú fíggjarleiðarin eftir 10 ár, hevur valt at royna nýggjar leiðir, er hetta kanska júst tín møguleiki!
Í øllum førum er eitt spennandi og avbjóðandi starv sum fíggjarleiðari hjá Bláa Krossi Føroya leyst til tín at søkja.

**Starvið:**
Í hesum starvi hevur tú ábyrgdina av øllum fíggjarviðurskiftum í felagsskapinum. Virksemi er nógv økt síðstu árini og krevur hetta tí, at tú ert før/ur fyri at hava nógvar bóltar í luftini samstundis, uttan at missa yvirlitið.

**Sum fíggjarleiðari kemur tú m.a. at hava ábyrgdina av:**
- Leggja fíggjarætlan fyri allar arbeiðsgreinar saman við leiðarunum
- Regluliga kunnað um fíggjarstøðu hjá ymisku arbeiðsgreinum og út frá hesum ráðgeva
- Skipað fyri innanhýsis fíggjarstýring og dagføra hesar í mun til inntøkur og útreiðslur
- Skriva umsóknir og verða við til inntøkufremjandi tiltøk
- Ábyrgd av samskiftinum við myndugleikar o.a. viðkomandi samstarvsfelagar innan fíggjarøki
- Skrivari í landsnevndini
- Verða við í leiðslubólki saman við øðrum leiðarum í felgasskapinum

**Førleikar/eginleikar:**
- tú ert útbúgvin HD, HA ella hevur líknandi hægri útbúgving og/ella royndir á økinum
- tú hevur áhuga og innlivingarevni í nýggj tiltøk
- tú ert álitisvekjandi og álítandi
- tú ert fyrikomandi og hevur samstarvsvilja
- tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur kunnleika til vanlig telduforrit
- tú vilt arbeiða samsvarandi blákrosshugsjónini

**Løn/setanartreytir:**
Starvið er eitt fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum. Lønin verður ásett smb. avtalu.

Meiri fæst at vitað um starvið við at venda sær til Jaspur Langgaard á tlf. 470 700

Umsókn saman við prógvum, viðmælum v.m. skal verða okkum í hendi í seinasta lagið mánadagin 30. januar 2006

## Bláí Krossur Føroya
**Jaspur Langgaard, aðalskrivari**
**Heiðavegur 6**
**620 Runavík**

*Bláí Krossur Føroya hevur smb. §2 í viðtøkum felagsins til endamáls:*
*- at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum*
*- at fyribyrgja, at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni*
*- at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi*
*- at boða gleðiboðskapin um Guðs kærleika til menniskju*

Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS




Í sambandi við at nýggja barnaverndarlógin kemur í gildi tann 1. jan. 2006, verður søkt eftir fosturfamiljum kring alt landið.

Vit søkja bæði eftir fosturfamiljum, ið kunnu hava børn til umlætting og fosturfamiljum, sum kunnu vera bráðfeingis fosturheim, fyribils fosturheim og varandi fosturheim.

FØRLEIKAKRØV
Fyri at kunna góðkennast sum fosturforeldur krevst:

- Rein revsiváttan
- Læknaváttan um heilsustøðu
- Góðar bústaðarumstøður
- Fíggjarligu viðurskiftini eru í lagi
- Neyðug umsorganarevni og foreldraførleiki
- Møguligar royndir sum uppalarar

SETANARVIÐURSKIFTI
Avtala verður gjørd við Barnaverndarstovu Føroya og avvarandi Barnaverndarnevnd um:

- Tíðarætlan
- Samsýning
- Samverurættin hjá foreldrum og øðrum
- Stuðul, vegleiðing og luttøku í undirvísing

Samsýningin verður sambært kunngerð nr. 3 frá 3. mars 2004 frá Almanna- og Heilsumálaráðnum um samsýning til fosturforeldur.

UMSÓKN
Umsókn saman við reinari revsiváttan, læknaváttan um heilsustøðu og avrit av prógvum verður at senda til:

Barnaverndarstovu Føroya
R.C. Effersøesgøta 30
FO-100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 28. februar 2006

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tanntekníkari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

Lesið Sosialin

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A




## Tað er ikki so galið í Tórshavnar kommunu

**Dagstovnurin Sólareygað**
Dagstovnurin Sólareygað søkir eftir trimum pedagogum at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 15. februar 2006 ella eftir nærri avtalu og einum pedagogi at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
**Umsóknarfreist:** Fríggjadagin 10. februar 2006.
**Setanarviðurskifti:** Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini**
Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini søkir eftir einum reingerðarfólki at arbeiða 15 tímar um vikuna at byrja 15. februar 2006 ella eftir nærri avtalu.
**Umsóknarfreist:** Mánadagin 13. februar 2006.
**Setanarviðurskifti:** Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Býlingshúsið í Maritugøtu**
Býlingshúsið í Maritugøtu søkir eftir tveimum reingerðarfólkum at arbeiða 10 tímar um vikuna at byrja 12. februar 2006 ella eftir nærri avtalu. Arbeitt verður frá kl. 17.00 til 19.00 mánadag til fríggjadag. Størvini eru tíðaravmarkað fram til 31. juli 2006.
**Umsóknarfreist:** Mánadagin 6. februar 2006
**Setanarviðurskifti:** Størvini verða sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Les meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni